

*Her sita tey væl beint upp at viðarlundini*

# Eitt megnartak at byggja Naina

**Tvær danskar kvinnur eiga størsta heiðurin fyri, at hvíldarheimið Naina nakrantíð varð bygt. Við áhaldni fingu tær pening til vega, tí tær sóu, at tørvur var á einum hvíldarheimi til fátækar og útstríddar kvinnur í Føroyum. Hóast korini nú eru betri, er framvegis tørvur á hvíldarheiminum, sum í dag fyllir 75 ár, sigur Ása Olsen, leiðari**

Randi Jacobsen
Myndir: Álvur Haraldsen

Tað hvílir ein serligur friður yvir hvíldarheiminum Naina í Gundadali í Havn. Hvíldarheimið minnir ikki um nakran stovn. Har valdar heimligt ró.

Lakeraðu trappurnar skína, og stovurnar eru hugnaligar við sínum vakra innbúgvi og nógvum málningum á bróstunum.

Naina stendur har beint upp at viðarlundini í eini grønari lagd við vøkrum útsýni.

Í dag eru 75 ár liðin, síðan Naina læt upp, og tað verður hátíðarheildið við móttøku, har Tórshavnar Manskór fer at syngja.

Naina, sum merkir eitt vakurt stað, er uppkallað eftir donsku kvinnuni Naina Scharla Nielsen, sum í 20-árunum kom til Føroya at undirvísa í húsarhaldi. Áhugan fyri Føroyum fekk hon, tí hon í Danmark hevði fleiri næmingar úr Føroyum, og so hevði hon eisini hug at uppliva nakað.

Í 1929 bygdi hon ein húsarhaldsskúla í Havn, og eftir at hava verið runt í landinum og sæð, hvusu ússaligt lív nógvar familjur livdu, fekk hon tað hugskot at stovna eitt hvíldarheimi við húsarhaldsnæmingum sum arbeiðsmegi og á tann hátt halda útreiðslunum niðri. Hetta var meðan ruberklarnir gingu, og kvinnurnar áttu upp í 16 børn. Kvinnurnar vóru illa fyri.

Naina Scharla Nielsen kom ikki á mál við síni ætlan, tí hon doyði í 1934 av bróstkrabba einans 41 ára gomul. Ætlanin við at hava næmingar sum arbeiðsmegi kundi ikki rættiliga brúkast.

## Nógvar gávur

Men hon hevði ein góðan hjálpara, sum æt Alma Juhlert, sum setti sær fyri at fullføra ætlanina hjá Nainu.

Naina hevði testamenterað sínar ognir til ætlanina, men tá ið arvingarnir høvdu fingið sítt, vóru bara 5.600 krónur eftir. Og tað var langt frá nóg mikið til at byggja eitt hvíldarheim fyri.

Alma Juhlert fór so til verka. Í Danmark eydnaðist henni at savna 25.000 krónur inn m.a. frá vælviljaðum fyritøkum og einstaklingum, og hon syrgdi eisini fyri at fáa sement úr Danmark fyri hálvan prís. Hon fekk ein byggimeistara at koma til Føroya at standa fyri bygginginj, tí føroyingar vóru tá ikki vanir við betongarbeiði.



*– Hetta húsið er so deiligt, at eg gleði meg hvønn morgun at koma til arbeiðis, sigur Ása Olsen, leiðari*

Timbrið varð somuleiðis keypt bíliga.

## Skjótt og gott verk

Fyri at sleppa bíligari varð søkt eftir handverkarum, sum vildu koma at gera arbeiðið fyri hálva løn, og tað stóð ikki á at fáa nóg mikið av fólki.

Arbeiðið byrjðai í juni, og í september sama ár var húsið longu takt. 23. februar 1936 var húsið klárt at flyta inn í. Tað gingu sostatt bara níggju mánaðir, frá tí at arbeiðið byrjaði, til húsið stóð liðugt.

Samstundis fór innsavning fram í Føroyum, og hóast vánaligar tíðir, komu 15.000 krónur inn. Av teimum komu 800 krónur frá skúlabørnum.

Heimið fekk nógvar gávur frá høgum og lágum. Lánið var einas 5.000 krónur.

## Eitt kall

Maður Almu æt Ehrenfryd Juhlert, og hansara partur lá ikki eftir.

Tey vóru missiónsfólk og sóu tað sum eitt kall við hvíldarheiminum Naina.

Tey trúðu fult og fast uppá, at Várharra helt hondina yvir heiminum, tí hvørja ferð tað stóð á, kom ein óvæntað hjálp.

Tá ið handverkararnir skuldu hava løn, var eingin peningur tøkur.

- Beint tá kom ein maður framvið av tilvild og beyð sær at keypa húsini hjá Almu og Ehrenfryd Juhlert. Tað var annars ikki lætt at finna keypara, men hesin maðurin legði peningin á borðið, og tí bar til at gjalda monnunum løn, greiðir Ása Olsen frá.

Tey bæði búðu so í kjallaranum á hvíldarheiminum, og tey fingu sær ikki løn frá heiminum.

Eina aðru ferð var ein blaðmaður á Berlingske Tidende og vitjaði fyri at skriva um heimið.

Tá var vanligt, at fólk seldu fisk, og tað kom blaðmanninum fyri oyrað, at